# Kim Larsen til Føroya

**23. og 25. august spælir fólkakærasti danski sangarin seinastu 30 árini Kim Larsen konsertir í Føroyum, fyrireikari er G! Booking, hetta váttar Jón Tyril fyriskipari fyri Sosialinum í dag**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Kim Larsen kunnger fólkakæri sangarin, at hann seinnapartin av august mánaði er á konsertferð í Norðuratlantshavi, og at hann 23. og 25. august spælir í Føroyum. Atgongumerkini til konsertirnar hjá Kim Larsen í Reykjavík 26. og 27. august vórðu sett til sølu í hesi vikuni, og øll 1.600 vórðu seld eftir einans trimum tímum.

Jón Tyril sigur, at atgongumerkini til konsertina, ella konsertirnar í Føroyum eftir ætlan verða sett til sølu fyrst í juni. Men hann vil hvørki siga, hvar konsertin verður, ella um talan verður um fleiri konsertir, men hann sigur, at um fleiri konsertir verða, so verður tað við sama fyriskipara. Spurdur um konsert verður í Gøtu, svaraði hann: Neyvan!

Jón Tyril sigur, at enn eru samráðingar um júst hvar konsertin ella konsertirnar verða og alt er ikki avgjørt hesum viðvíkjandi. Hann vil tí ikki siga ov nógv. Hann heldur fram, at G! Festivalurin hevur roynt at fáa Kim Larsen at spæla á festivalinum øll árini, hetta hevur ikki eydnast. Men tá tey spurdu seg fyri í ár, fingu tey tilboð um, at hann kundi koma í august.

Jón Tyril er sera spentur um hetta. Hann sigur, at talan er um tann danska Bob Dylan.

- So hetta er ræðuliga stórt. Vit eru bæði fegin og errin um at fáa eitt av allarstørstu og fólkakærastu norðurlendsku nøvnunum upp í august. Vit gleða okkum og ivast ikki í at mong kring landið gleða seg, sigur Jón.

# Kim Larsen er fólkaogn

**Seinastu ferð Kim Larsen vitjaði í Føroyum var á Tórshavnar Jazz-, Fólka- og Bluesfestivali í 1996. Tá vórðu atgongumerkini til fyrstu konsertina seld eftir eini løtu, og skipað varð fyri tveimum eykakonsertum, sum báðar vóru útseldar**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*80 árini gjørdust sera góð fyri Kim Larsen. Hann gav eina ørgrynnu av landaplágum út. »Blip båt«, »Midt om natten«, »Susanne himmelblå«, »Forklædt som voksen«, »Jutlandia« og »Yummi Yummi« eru bara nøkur fá av teimum løgum, sum eru vorðin fólkaogn*

Nøgv er broytt, síðan Kim Larsen var í Føroyum seinast. Hóast hann tá seldi nógv atgongumerki í Føroyum, var fløgusølan í einum aldudali. Kim Larsen hevur við teimum seinastu fløgunum vunnið sær veg aftur úr aldudalinum. Hann er ein tann best seljandi danski tónlistarmaðurin í løtuni. »Glemmebogen« og »Glemmebogen 2 Jul og Nytår«, eru tolkingar av kendum gomlum donskum sangum, sum Kim Larsen gevur sín egna dám. Meðan »7-9-13« eru løg hjá Larsen sjálvum. Eisini DVD'in »Det var en torsdag aften« var sera væl dámd.

»Glemmebogen 2« við gomlum jóla- og nýttárssangum seldi fyrstu tríggjar vikurnar 110.000 eintøk. Hetta er nokk til, at fløgan fær dupulta platín. Sjálvt um hetta eru sera høg sølutøl, er hetta lítið av miklum.

»Midt om natten«, sum Kim Larsen gav út 1983, seldi 500.000 eintøk og er mest selda útgáva nakrantíð í Danmark. Filmurin av sama navni gjørdist somuleiðis vælumtóktur, og gjørdi Kim Larsen til danska fólkaogn.

Kim Larsen byrjaði sítt lív sum tónleikari í bólkinum Gasolin. Fyrstu stakpláturnar hjá bólkinum komu út í 1969. Bólkurin gjørdist best umtókti danski rokkbólkur í 70 árunum. Larsen skrivaði flestu løgini hjá bólkinum, men gav samstundis fløgur út sum einstaklingur. Í 1973, vórðu »Værsgo«, við Kim Larsen og »Gas 3« við Gasolin, best og næst best umtókta fløga í Danmark.

Kim Larsen royndi bæði við Gasolin og sum einstaklingur, at sleppa inn á amerikanska marknaðin við fløgum á enskum máli. Men hetta eydnaðist ongantíð. Í 1979 góvust Gasolin.

80 árini gjørdust sera góð fyri Kim Larsen. Hann gav eina ørgrynnu av landaplágum út. »Blip båt«, »Midt om natten«, »Susanne himmelblå«, »Forklædt som voksen«, »Jutlandia« og »Yummi Yummi« eru bara nøkur fá av teimum løgum, sum eru vorðin fólkaogn.

Í 1995 flutti keypmannahavnarin Kim Larsen til Odense, har stovnaði hann bólkin Kjukken, sum hann hevur spælt við líka síðan. Saman hava teir givið 6 fløgur og eina DVD út. Teir hava verið í Føroyum einaferð fyrr, og í august koma teir aftur.




Summar Festivalurin:

# Selt 1.000 atgongumerki í Klaksvík



*– Tað er heilt óvanligt, at fólk keypa so nógv atgongumerki í so góðari tíð. Vit hava ongantíð fyrr upplivað so stóran áhuga fyri einum tiltaki, sum vit hava selt atgongumerki til, sigur Malan Berg, varaleiðari á Shell-støðini í Klaksvík*

**Sølan av atgongumerkjum til Summar Festivalin gongur óvanliga væl, og ikki minst á heimavøllinum í Klaksvík er sølan ovurhonds stór. Bara í Klaksvík eru seld 1.000 vikuskiftispass**

SUMMARFESTIVALUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Forsølan av vikuskiftispassum til Summar Festivalin í Klaksvík gongur óvanliga væl. Herfyri var talið á seldum vikuskiftispassum komin upp um 1.300, men síðani eru nógv atgongumerki seld kring landið.

Sølan gongur væl í Havn, Eysturoynni og aðrastaðni kring landið, men tann størsta sølan higartil hevur verið í Klaksvík.

Tvey sølustøð eru í Klaksvík, og tey hava havt úr at gera orsaka av Summar Festivalinum. Norðoya Kunningarstova selir atgongumerki og roynir at finna fólki innivist, og Shell-støðin selir vikuskiftipass í langum banum.

Í gjár var talið á seldum vikuskiftispassum í Klaksvík komin upp á 1.000.

– Tað er heilt óvanligt, at fólk keypa so nógv atgongumerki í so góðari tíð. Vit hava ongantíð fyrr upplivað so stóran áhuga fyri einum tiltaki, sum vit hava selt atgongumerki til, sigur Malan Berg, varaleiðari á Shell-støðini í Klaksvík.

### Fólk eru í góðari tíð

Vikuskiftispassið til Summar Festivalin, sum er galdandi fyri bæði fríggjadagin og leygardagin, verður fram til 1. juni selt fyri serligan prís. Eftir 1. juni hækkar prísurin, og tað er viðvirkandi til, at fólk keypa sær atgongumerki í so góðari tíð.

– Tað eru sera nógv fólk, sum vilja tryggja sær atgongumerki áðrenn 1. juni, og tey ringja í heilum og spyrja, um tað er útselt. Men vit hava atgongumerki eftir og ætla at selja heilt fram til 1. juni, sigur Malan Berg.

Summar Festivalurin hevur higartil avdúkað fýra nøvn. Írski Brian McFadden, bretski Shakin' Stevens, danska Anne Linnet og føroysku Lawetz skulu spæla á festivalinum, men nógvir aðrir bólkar verða eisini við, og teir verða avdúkaðir so hvørt næstu vikurnar.